# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 24-06-2021

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2021**
(Kvotutøl stillað og atgongd til íslendskan sjógv)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 7 frá 15. januar 2021 um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2021 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3, stk. 1 verður "117.053 tons" broytt til: "127.053 tons".

**2.** § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Føroyska heildarkvotan av norðhavssild í 2021 er 110.951 tons."

**3.** Í § 4, stk. 1 verður "74.621 tons" broytt til: "82.013 tons".

**4.** Í § 4 verður sum stk. 3 sett: "*Stk. 3.* Kvota sambært stk. 1 kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum."

**5.** Tvær staðni í § 5, stk. 1 verður "5.444 tons" broytt til: "5.984 tons".

**6.** § 6, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Kvota sambært stk. 1 verður latin sum felags árskvota og kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum."

**7.** Í § 7 verður "5.934 tons" broytt til: "6.522 tons".

**8.** Í § 8, stk. 2 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Avlopsnøgdin kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum."

**9.** Í § 9, stk. 1 verður "14.952 tons" broytt til: "16.433 tons".

**10.** Í § 9, stk. 2 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Avlopsnøgdin kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, xx. juli 2021

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert